Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Eftirlit við festum

Spurningar:

1. Hevur Búnaðarstovan gjørt nakra ætlan fyri, hvussu reglulig sýn kunnu verða gjørd av festum?

2. Hvussu nógv festisýn hevur Búnaðarstovan gjørt seinastu tvey árini?

Viðmerkingar:

Fyri tveimum árum síðani setti Heðin Mortensen, sum tá var løgtingsmaður, undirritaða, sum tá var landsstýrismaður, ein § 52a fyrispurning, nr. 92/2019, har spurt varð, um nøkur skylda ella ábyrgd er hjá Búnaðarstovuni at hava eftirlit við ella vitja festi til tess at tryggja, at festibrævið er dagført.

Í svarinum til fyrispurningin varð millum annað sagt: “Búnaðarstovan hevur sambært lóg um landsjørð skyldu til at hava eftirlit við almennu festunum, ikki bara tá ið festaraskifti er. Hetta eftirlit hevur ikki virkað nóg væl seinastu árini, men stig eru tikin til at fáa hesi viðurskifti í rættlag, og Búnaðarstovan er biðin um at fyrireika eina ætlan soleiðis, at festisýn frameftir verða framd regluliga.”

Nú tvey ár eru liðin, síðani nevndi spurningur varð svaraður verður spurt, um gongd er í málinum.

Á Løgtingi tann 16. juni 2022

Helgi Abrahamsen